# tey brekaðu



*Eitt heimskort hongur á bróstinum í felagshølunum hjá ÍSB í ÍSF-húsinum. Tey trý, Elna Skylv Hansen, Egga Jensen og Johan Samuelsen halda, at tað hevði verið stuttligt, um onkur hevði sett nálir í allastaðnis, har fólk frá ÍSB hava vitjað, tí tey støðini eru mong í tali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

fingu Merkið at ganga inn undir, so sótu tey á áskoðaraplássunum, tá ið setanin fór fram.

Fronsku fyrireikararnir vendu sær til donsku umboðsstovuna, og hagani varð sagt, at føroyingarnir saktans kundu ganga inn undir Dannebrog. Men føroyingarnir stóðu við sítt, og tá ið setanin var á skránni, sótu føroyingarnir millum áskoðararnar.

ÍSB boðaði síðani altjóða sambandinum frá tilburðinum, og fronsku fyrireikararnir fingu eina nøs fyri hendingina.

Stutt eftir var altjóða fundur í London, og tá løgdu fraklendingar fram eitt uppskot um, at lond, ið ikki vóru sjálvstøðug, blivu strikaði sum limir. Hetta hevði havt við sær, at føroyski limaskapurin bleiv strikaður, um uppskotið bleiv samtykt. Egga Jensen, sum var á fundinum í London saman við Jón á Steig, ivast ikki í, at uppskotið var ein hevnisøka fyri tilburðin við flagginum í París.

Tíbetur fyri ÍSB slóu norðurlendsku londini ring um Føroyar. Tey boðaðu fundinum frá, at varð uppskotið samtykt, og Føroyar harvið blivu ekskluderaðar úr altjóða samstarvinum, tóku tey seg eisini aftur úr altjóða felagsskapinum. Tískil varð uppskotið tikið aftur.

## Bar fram olympiska eiðin

Av mongu teimum ógloymandi løtunum, ið eldsálirnar í ÍSB, minnast aftur á, eru tað tó nakrar, ið standa klárari enn aðrar. Egga Jensen, ið kanska er Mr. ÍSB burturav, minnist aftur á Paralympics í New York í 1984.

Beint áðrenn setanina skuldi byrja, kom eitt umboð fyri fyrireikararnar til fólkini hjá ÍSB. Hann greiddi frá, at tey høvdu funnið út av, at Føroyar var tað minsta av luttakandi londunum, og tí skuldi eitt av føroysku ítróttarfólkunum bera fram olympiska eiðin. Hesin heður fall Ólavi Kongsbak í lut, og tað gjørdi hann til lítar. Harumframt slapp Ólavur Kongsbak eisini at heilsa upp á táverandi ameriknska forsetan, Ronald Reagan, í hesum sambandi.

## Krevur nógva fíggjarliga orku

Ikki óvæntað krevur tað nógvar pengar at verða eitt so virkið sersamband, sum ÍSB nú einaferð er. Mongu uttanlandaferðirnar hjá føroysku ítróttarfólkunum eru kostnaðarmiklar, og tað er vert at hava í huga, at hjá ÍSB vil tað altíð verða munandi dýrari at ferðast enn hjá øðrum sersambondum, tí at tað vanligani er neyðugt hjá fleiri av íðkarunum at ein hjálpara við.

Árligi umsetningurin hjá ÍSB liggur oman fyri eina millión. Nakað av stuðuli fæst frá landinum og Tórshavnar Býráð. Harumframt fær ÍSB ein part av veddingarpengunum, men framvegis noyðist sersambandið sjálvt at útvega meiri enn helmingin av øllum inntøkunum, ið skulu til.

Í hesum sambandi eru høvuðsstuðlarnir hjá ÍSB, Føroya Lívstrygging og Skemman, av sera stórum týdningi fyri virksemi hjá sersambandinum. Báðir hesir stuðlar hava verið knýttir at ÍSB í drúgva tíð, og Johan Samuelsen, ið hevur ábyrgdina av fíggjarliga partinum hjá ÍSB, sigur, at týdningurin hjá stuðulunum kann ikki lýsast við orðum.

Vanligani eru ikki nógvir áskoðarar til kappingarnar, ið ÍSB skipar fyri, og tí er tað altíð ókeypir at koma inn til kappingarnar.

Tíbetur hevur ÍSB eitt sera virkið stuðlafelag, sum í mong harrans ár trúfast hevur skipað fyri ymsum tiltøkum, ið hevur útvegað ítróttinum fyri brekað í Føroyum pengar.

## Nógv mál eru rokkin

Lítandi aftur á hesi 25 árini, sum nú eru farin aftur um bak, duga bæði Egga Jensen, Johan Samuelsen og Elna Skylv Hansen at síggja, at nógv av teimum málum, ið upprunaligа vóru sett, eru rokkin, og tað er at frøðast um.

Í veruleikanum er ÍSB komin so mikið langt, at av tí at fleiri av málunum í lógini fyri ÍSB eru rokkin, og tí er neyðugt at fara undir at endurskoða viðtøkurnar.

Í løtuni eru tey farin undir at arbeiða við hugsjónini og virðisgrundarlagnum aftan fyri ÍSB.

Hesi 25 árini hava tað eisini verið fyriskipaðar fleiri kappingar í Føroyum. Eitt nú var NM í svimjing í Føroyum í 1987, og tað er ivaleyst størsta tiltakið, ið ÍSB hevur staðið fyri.

Komandi ár skal ÍSB so verða vertur fyri norðurlendska meistaraskapinum í boccia. Men leiðslan í ÍSB heldur ikki, at umstøðurnar til at hýsa veruliga stórum tiltøkum ella kappingum fyri brekað í Føroyum eru nóg góðar.

- Tað er serliga innan gisting, at trupulleikin er stórur. Eitt nú hevur annað av teimum báðum stóru gistingarhúsunum í Havn einki kamar, ið er gjørt til brekað, og yvirhøvur eru umstøðurnar hjá teimum brekðu sera vánaligar í Føroyum, siga tey trý við ein munn.

Ítróttarsambandið fyri Brekað í Føroyum fevnir í dag um fleiri ymisk ítróttartilboð, ið eini 250 íðkarar kring alt landið taka lut í. Ítróttargreinarnar eru hesar. svimjing, boccia, borðtennis, frælsur ítróttur og bóltspøl.



*Heidi Andreasen hevur verið ein tann fremsti íðkarin hjá ÍSB seinnu mongu árini. Her er hon avmyndað saman við venjara sínum, Remi Lamhauge, undan Paralympics í Athen í fjør.*

*savnsmynd*



*Ein tann best umtókta ítróttargreinin í ÍSB-høpi er boccia. Her eru nakrir av vinnarunum av einari kapping, sum var í Klaksvík.*

*savnsmynd*



*Durita Strøm vann fleiri heiðursmerkir í svimjing, tá ið Special Olympics var í Dublin í 2003*

*savnsmynd*